www.synergi.fo
Tak út og goym!

# AKTUELT Á SKRÁNNI HJÁ SYNERGI



**11. FEBRUAR — FAKNET - LEIÐARAR V/STARVSFÓLKAÁBYRGD**
Kom við í netverkið fyri leiðarar við starvsfólkaábyrgd, fá sparring og íblástur. Max. 40 limir - www.faknet.fo

**16. FEBRUAR — EXCEL I - TEY FYRSTU FETINI - 2 DG.**
Situr tú enn við roknimaskinuni og hyggur eitt sindur øvundsjúk/ur eftir teimum, sum bara tasta alt inn á Excel og vupti, so er úrslitið klárt? Ella brúkar og hevur tú kanska brúkt Excel í minni mun, men kundi hugsa tær at lært forritið heilt frá grundini? Kom við og lær Excel saman við tínum líkum ;-)

**18. FEBRUAR — LÆR MS OFFICE 2007 - 1 DG.**
Legg frustratiónirnar á hyllina og spar tíð við at læra nýggju funkurnar í Office 2007

**26. FEBRUAR — POWERWRITING/FLÓÐSKRIVING - 1 DG.**
Lær hvussu tú sleppur undan skriviblokering, undan at útseta skriviuppgávurnar og hvussu tú kanst spara tíð og fáa eina javna og virkna skrivitilgongd. Á skeiðnum lærir tú at menna eitt meiri natúrligt, persónligt og flótandi mál og hvussu tú fært lættari hugsanargongd og góð hugskot.

**2. MARS — SKEIÐ UM STRONGD - 1 DG.**
Strongd ger at vit bæði arbeiða verri og fáa eina vánaligari lívsgóðsku. Strongd ávirkar okkara sinnalag, svøvn, sosiala tørv, hvussu væl vit eru fyri, mentalu evnini o.s.fr. Við virknari strongdarhandfaring ber til at virka betur, bæði til arbeiðis og heima. Ger nakað við tað nú!

**6. MARS — ENNEAGRAM - MODUL I - 3 DG.**
Enneagrammið hjálpir okkum at skilja og góðtaka ymiskar persónstypur. Hetta hava kendar og vælriknar fyritøkur so sum Microsoft, Novo Nordisk og Pfizer í Danmark tikið til sín. Hesar brúka Enneagrammið í teirra innanhýsis samskifti.
Eitt sera gott og mennandi skeið, siga luttakarar frá í heyst.

**16. MARS — EXCEL II - TIL TEY TJEKKAÐU - 2DG.**
Nú er stundin komin at gagnnýta og fáa gleði av øllum funkunum, sum tú meira ella minni veitst eru í Excel, men sum tú barasta ikki hevur havt stundir til at læra teg... enn? Hugsar tú ofta, at tú kundi gjørt títt arbeiði bæði væl betur og skjótari, um tú hevði gagnnýtt Excel betur? Pivottabellir, skabelónir, treytaðar formateringar, treytaðar formlar, smartir snarvegir... you name it!

**18. MARS — THE VERY BEST OF EXCEL, WORD, OUTLOOK OG POWERPOINT - 2 DG.**

**19. MARS — STARVSFÓLKAHONDBÓKIN - 1DG.**

**25. MARS — BETRI STÝRING OG RYKKJAN AV SKULDARUM (DEBITORUM)**

*UMFRAMT ONNUR SKEIÐ - WWW.SYNERGI.FO*

## Kæru viðskiftafólk

Omanfyri eru nøkur av okkara skeiðum, sum vit skipa fyri í løtuni. Legg til merkis, at skráin verður dagførd javnan á okkara heimasíðu. Skeiðini hava vit neyvt valt út. Eitt nú hava okkara undirvísarar í telduskeiðum sera drúgvar royndir, umframt at Bosholdt hevur verið kosin Årets It-underviser, hjá donsku skeiðsfyritøkuni Confex, ið Synergi samstarvar við.

Meiningin við Synergi, er at geva tí føroyska samfelagnum meirvitan og íblástur til at menna seg, soleiðis at vit fáa eitt betri samfelag, betri fyritøkur og glaðari og enn meiri eldhugað starvsfólk. Vit ynskja at náa hesum í samstarvi við stovnar, fyritøkur og okkara viðskiftafólkum.

## Fyritøkuskeið

Øll skeiðini kunnu skipast sum fyritøkuskeið, uttan at tað verður dýrari hjá fyritøkuni - faktiskt bíligari.

Ring og fá eitt óbindandi prát. Vit koma eisini fegnar út at greiða frá, hvat vit hava at bjóða, soleiðis tit kunnu optimera tykkara førleikamenning. Vit gleða okkum at arbeiða saman við tykkum og at veita tykkum okkara tænastu.

Vit 5 hjá Synergi
- Birita, Margreta, Durita, Annika & Ása

Synergi

Synergi - Tvørgøta 13 - 100 Tórshavn - tel. 32BELL (322355) - fartel. 22RING (227464) - fax. 322FAX (322329) - www.synergi.fo - synergi@synergi.fo